# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Danskur kreppupakki

Danska stjórnin hevur gjørt semju við flestu andstøðuflokkarnar um ein hjálparpakka til danska bankakervið. Hjálparpakkin, sum fevnir um ein grunn, 35 milliardir til støddar, ið skal tryggja innskjótarunum fullan dekning, um peningastovnur fer av knóranum. Hetta er eitt sera stórt stig, ið til fulnar avdúkar, hvussu álvarsom altjóða fíggjarkeppan er. Hetta, at Danmark við síni neoliberalistisku stjórn, ið hevur ein hin sunnasta og sterkasta búskapin í heiminum, má taka til slík ráð sigur eitt sindur um støðuna.

Danska loysnin er sera áhugaverd á mangan hátt og fyrst og fremst tí, at tað í fyrstu atløgu eru bankarnir sjálvir, ið skulu skjóta stovnsfæið inn í nýggja trygdargrunnin. Hetta gera teir ikki av fríum vilja, men eru tvungnir av stjórnini. Danski statskassin veðheldur fyri peningin, og verður tørvur á meira enn hesum 35 milliardunum, so bindur danski staturin seg til at bera útreiðslurnar av hesum. Í smálutum merkir loysnin, at danskir bankakundar og aðrir vanligir kreditorar fáa fulla trygd fyri tí peningi, sum hesir hava standandi inni í donskum peningastovnum. Samstundis, sum hendan skipan kemur í gildi, verður endi gjørdur á óskilinum við ovurstóru stjórabonusum og optiónum, ið hava eyðkent danska bankakervið, og sum hava argað Pallaba og Marsonnu.

Her er sum nevnt talan um eitt óvanligt stig hjá eini danskari stjórn, sum er kend fyri sína borgarligu og liberalistisku kós, men tiltakið er, sambært stjórnini, neyðugt til tess at tryggja fíggjarliga stabilitetin í landinum. Stjórnin hevur viðurkent, at altjóða fíggjarmarknaðirnir hanga saman, og merkir hetta, at stórir trupulleikar í eini skipan hava lyndi til at breiða seg til alla skipanina. Tað er ikki minni áhugavert, at breið politisk semja er í hesum máli. Danska stjórnin hevur verið kroyst av hesum máli eina tíð, og tá so onnur lond bæði innan sum uttan ES um vikuskiftið tóku til rættiliga ógvusligar bankabjargingar, fór stjórnin til verka og í nátt varð so henda søguliga semjan gjørd. Semjan fevnir um stjórnarflokkarnar, Javnaðarflokkin, Danska Fólkaflokkin, Radikala flokkin og Liberalu samgonguna. Hetta merkir, at Eindarlistin, SF og Norðuratlantsbólkurin ikki eru við í bankasemjuni.

Tað er enn eitt sindur ógreitt, hvat, ið hendir í Íslandi, har bankar eru í álvarsomum trupulleikum. Í næstum fæst at vita, um íslendska stjórnini fer longur enn at bjarga størsta bankanum, Glitnir. Vit í Føroyum mugu sigast at vera heppin, eftirsum danska bankabjargingin eftir øllum at døma eisini fevnir um føroysku peningastovnarnar, og hugurin at yvirtaka alt hetta økið man í dag valla vera tann stóri. Bankakreppan og hjálparpakkarnir eru áhugverd í søguligum høpi við tað, at hetta hendir undir liberalum stjórnum, ella stjórnum, sum allar játta seg til neoliberalismuna og frælsu marknaðarkreftirnar.

**Sosialurin**

## Ein styrki fyri politisku skipanina, um løgmaður verður valdur beinleiðis av fólkinum



**KÁRI P. HØJGAARD**
løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin

Fari at ynskja Kaj Leo Johannesen tillukku við løgmanssessinum og góða eydnu og hepna hond í nýggja starvinum sum samgonguleiðari.

Í longum talvi eru nógvir leikir, og fæstu mundu vænta, at úrslitið av hesi truplu telving skuldi enda soleiðis, sum tað nú einaferð gjørdi, tí undirtøkan hjá núsitandi løgmanni var í fleiri meiningskanningum eitt tað lægsta, samanlíknað við úrslitið hjá formonnunum í hinum stóru flokkunum.

Sjálvstýrisflokkurin hevur sum tann einasti politiski flokkurin í sínari stevnuskrá, at løgmaður skal veljast beinleiðis av fólkinum. Uppskotið til nýggja stýrisskipanarlóg rúmar eisini hesum møguleika.

Eftir miklu orrustuna um løgmanssessin, og tilvildina ið ræður í einum so týdningarmiklum máli, munnu nógvir føroyingar taka undir við ásetingini í stevnuskrá Sjálvstýrisfloksins og útsøgnunum hjá Sjúrði Skaale løgtingsmanni, tá hesin í fjølmiðlunum hevur víst á at rættast var um:

"Løgmaður varð valdur beinleiðis av fólkinum".

Spennandi verður at síggja, um meiriluti nú fæst á løgtingi fyri lógaruppskoti við hesi broyting, so Føroya fólk beinleiðis á fólkaatkvøðu fær loyvi til at velja sín stjórnarleiðara.

Týsdagin bleiv nevndarvalið avgreitt, og ein nýggjur gerandisdagur er aftur á Løgtingi. Tað verður ein avbjóðing hjá nýggja løgmanni okkara, at fáa samskipað arbeiðið í landstýrinum, við at fáa øll landstýrisfólkini at rógva í takt móti felags máli. Av teimum 9 sum í dag mynda landsstýrið, hava fýra roynt seg fyrr við so vánaligum úrslitið, at tey eru loyst úr starvi ella hava verið noydd at leggja frá sær í ótíð. Hetta er galdandi fyri Jóhan Dahl, Jákup Vestergaard, Helenu Dam á Neystabø og Jørgen Niclasen. Báðir undanfarnu løgmenninir, ið ráddu fyri borgum og høvdu ein virknan leiklut, tá hesi landstýrisfólkini máttu úr starvi í úrtíð, eru framhaldandi partur av sitandi samgongu. Anfinnur Kallsberg er fíggjarnevndarformaður, og Jóannes Eidesgaard landstýrismaður í fíggjarmálum.

At helmingurin av landstýrisfólkunum samstundis fáa eitt slíkt "come back", man verða nýtt heimsmet og sjálvsagt upptøkuevni til Guinnes Book of Record´s.

Líta vit aftur til desember 2003, gav Anfinnur Kallsberg løgmaður tánevnda Tjóðveldisflokkinum durafjórðingin og útskrivaði nýval, samstundis sum hann sendi teirra landsstýrisfólk til hús uttan ávaring, meðan landstýrisfólkini hjá Fólka, Mið- og Sjálvstýrisflokkinum sótu, til løgtingsvalið hevði verið og eitt nýtt landstýri avloysti. Avgerðin kostaði samstundis Anfinni Kallsberg løgmansessin.

Nú endurtók Jóannes Eidesgaard bragdið frá 2003 við lásagøluni í Tinganesi sum grundgeving og dropanum, ið fekk bikarið at flóta yvir. Tjóðveldi varð koyrt á dyr, meðan Mið- og Javnaðarlandstýrisfólkini vórðu sitandi, til ABC-samgongan tók við. Eisini í hesum føri mátti Jóannes løgmaður "leggja kongin", og Kaj Leo Johannesen avloysti í løgmanssessinum.

Um løgmaður varð valdur beinleiðis av fólkinum í eitt fýra ára valskeið, stóð hann nógv sterkari sum fólksins leiðari, tí hann ikki varð bundin av einum skinklandi samgongumeiriluta. Løgmaður stóð eisini frælsari í vali/setan av landstýrisfólkum, ella tá/um neyðugt var at loysa tey úr starvi, tí tað kundi hann gjørt uttan ótta fyri, at tað samstundis kundi kostað løgmanssessin.

## Tvøroyri kontra Farum



**FINNLEIF GUTTESEN**

Hví samanlíkna Tvøroyri við Farum, sum fór fallitt á ein so syrgiligan hátt og borgarstjórin í fongsul.

Jú, tí býráðið á Tvøroyri hevur ætlanir um at gera tað sama sum býráðið í Farum gjørdi. Kommunan ætlar at byggja fyri 150 milliónir krónur, selja tað til pf. Fastogn og leiga tað aftur frá pf. Fastogn, so at vit, okkara børn og barnabørn eru bundin til at gjalda milliónir í leigu um árið.

**Skuldin goldin um 85 ár**
Ætlanin er at byggja dubultsporaðan skúla til 480 børn, fótbóltsvøll og svimjihøll í Trongisvági fyri minst 150 milliónir krónur. Hervið vil skuldin, sum í dag er 65 milliónir krónur, indirektað økjast til 215 milliónir krónur, og tað hevði við verandi niðurgjalding av skuld, sum er 2,5 milliónir um árið, tikið 85 ár at goldið aftur.

Rokningin frá Århuus arkitektum til hetta uppskotið er 600.000 krónur.

**Planurin**
Tað má verða ein væltilrattaløgd ætlan aftan fyri eitt so stórt prosjekt, sum Tvøroyrar kommuna ongantíð hevði klárað at goldið aftur einsamøll. Tað er nærliggjandi at hugsa, at býráðið hevur ætlað, at tá ið øll Suðuroyggin er løgd saman til eina kommunu, so koma allir borgarar í oynni at gjalda fyri prosjektið í Trongisvági.

Tí kann eisini spyrjast, um Tvøroyrar býráð hevur kunnað hinar kommunurnar um prosjektið, spurt um samstarv og ætlanir hjá teimum?

**Álit**
Á almennum fundi í Vági nevndi borgarstjórin har, at hon manglaði álit, á hvønn, kom ikki ordiliga fram.

Varaborgarstjórin á Tvøroyri gekk hundrað prosent inn fyri samanlegging av øllum kommunum í Suðuroy, og tað skilur man væl, tá ið omanfyri nevnda prosjekt er í umbúna á Tvøroyri.

Tað er í fínasti lagi at roynt verður at betra um umstøðurnar á Tvøroyri, men ikki við at koyra okkum á ørmundarhús aftur.

### Gjald fyri valgreinar

Fram til kommunuvalið 11. november fer Sosialurin at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið er hálvur lýsingarprísur fyri t. e. 95 oyru fyri millimeturin. At rokna sum valgreinar eru allar greinar, sum valevni skriva - og geinar frá øðrum, sum blaðstjórnin metir sum valtilfar. Skipanin verður í gildi fram til kommunuvalið. Valgreinar skulu sendast við telduposti til post@sosialurin.fo - og tær skulu vera rættlisnar og harvið púra klárar at prenta.

**Blaðstjórin**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.